Hanna D. Andreassen

Fra: Jona Lamain <jonal@torshavn.fo>
Sendt: Tuesday, January 30, 2024 16:16
Til: Maria Michelsen
Emne: Viðmerkingar til lógaruppskot

Kategorier: Gul kategori

Hey Maria,
Eg sendi hervið viðmerkingar frá Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu til lógaruppskot um broytingar í barnaverndarlógina:

1. **§14 stk. 7:**
   Hví er bert talan um børn, ið búgva í DK og ikki um børn, ið búgva í øðrum londum?

2. **§15 stk. 1 nr. 12:**
   Vit sakna nærri frágreiðing/viðmerkingar um, hvat ítøkuliga verður hugsað um av hjálp til familju, ið ikki longu er fevnt av § 15 stk. 1 nr. 1-11. Sum heild manglar vegleiðing til lóg um barnavernd.

3. **§15 stk. 2:** ok

4. **§ 19 stk. 5:**
   Her verður bert "foreldramyndugleikin" nevndur, sum ein, ið BVT kann hjálpa. Tað kann eisini vera, at tørvur er á viðkomandi hjálp til makan hjá foreldramyndugleikanum, børn hjá makanum o.o. Familjurnar, sum bvt hevur samband við, eru ofta samansettar uppá nógvar mátar. Tørvur kann tí vera á, at kunna veita neyðuga hjálp til alt húskið, sum t.d. kann vera mamma (við foreldramyndugleika), maðurin hjá henni og børnini hjá manninum.

   Nevnt verður í uppskotinum, at "fyriskipanir skula viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum hava verið orsøk til at barnið varð sett heiman...". Støðan i heimunum kann tó broytast meðan barnið er sett heiman, t.d. kann eitt barn verða sett heiman grundað á misnýtslutrupulleikar. Seinni kann tað koma fram, at barnið hevur verið fyri kynsligum ágangi. Tørvur er tá á, eisini at kunna arbeiða við t.d. relatiónunum og marksetan í heiminum og ikki bert við upprunaligu trupulleikunum.

5. **§ 21 stk. 3:**
   Ynskiligt er at fáa nágreinað nærri, hvat bvt ítøkuliga kann taka avgerð um. Víst verður til at heimildin skal vera neyðug, í mun til endamálið við heimsetanin. Er hendan ásetingin ikki galdandi í málum, har avgerð er tikin um varandi umsorgarnaryvirtøku? Tørvur er á nærri lýsing av hvat bvt sjálv kann taka avgerð um, og hvat krevur eina avgerð frá Føroya Kærustovni. Kann bvt t.d. broyta uppihaldsstað, herundir at flyta barn úr fosturheimi á stovn undir AV ella krevur tað avgerð frá Føroya Kærustovni?

6. **§ 42 stk. 2 nr. 5:** ok

7. **§ 58 stk. 4:**
   Ynskiligt er at fáa upplýst hvørji objektiv kriterie skulu leggjast til grund fyri slíka avgerð. Vandi kann vera, at mál koma at skifta runt millum bvt, tá borgarin er ónøgdur. Her kundi man umhugsað aðrar loysnir, eitt nú at skipa bvt í størri eindir, brúka uttanhýsis fakligar konsulentar ella tilvitað menna og nýta faklig háttløg, fyri at betra um samstarvið millum partarnar.
   Tað sær út til, at barnaverndartænastan, sum yvirtekur eitt mál og ábyrgdin av málinum, eisini rindar útreiðslurnar, ið standast av málinum. Hetta kann elva til at barnaverndartænastur ikki vilja/kunnu átaka sær mál frá øðrum barnaverndartænastum.

Generell viðmerking:

Barnaverndartænastan hevur fleiri uppskot til aðrar broytingar, ið átti at vera gjørt til barnaverndarlógina, og vil tískil mæla til at barnaverndarlógin verður endurskoðað í síni heild t.d. í mun til avgerðarrættur í mun til umsiting/nevnd. Man kundi lagt avgerðarrættin til umsitingin sjálv, og at umsorgarnaryvirtøkumálini blivu send til Føroya Kærustovnur.

Man kundi eisini endurskoðað reglurnar um stuðul til foreldur, ið hava umsorgarnaryvirtikin børn har man aðrastaðni hevur skipanir við óheftar stuðlar til slík foreldur.
Harumframt kundi man hugt nærri eftir reglurnar fyri nær foreldur hava rætt til ókeypis umboðan. Tað hevði verið ynskiligt í nøkrum førum at havt møguleika fyri at játta ókeypis umboðan til foreldur áðrenn niðurstøðan er, at umsorgarnaryvirtøka er neyðug.

Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við okkum, um tit hava spurningar hesum viðvíkjandi.

Blíðar heilsanir / Best Regards

Jona Lamain
Toymisleiðari

_____
Tórshavnar kommuna
Sosiala deild

Vaglið
Postboks 32

Tlf.302060
jonal@torshavn.fo
barnavernd@torshavn.fo
www.torshavn.fo